# Kolvetni staðfest á føroyskum øki



Niels Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum, sigur, at fundið á Anne Marie fyrst og fremst staðfestir, at kolvetni er í føroyska økinum

**Faroe Petroleum boðar frá, at boringin á Anne Marie økinum hevur staðfest kolvetni í tunnum sandløgum. Tað merkir, at kolvetni finst í føroyskum øki, og nú skulu nærri kanningar vísa, í hvussu stórum nøgdum kolvetni finst**

Leo Poulsen

– Hetta merkir fyrst og fremst, at kolvetni finst á føroyskum øki.

Tað sigur Niels Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum, sum eigur 12,5% av loyvinum á Anne Marie økinum, har boringin er farin fram.

Hann veit tó ikki enn at siga nakað um, hvussu stóran týdning hetta fundið hevur.

– Tað skulu nógvar kanningar til, áðrenn til ber at siga nakað um hetta fundið. Kannast skal bæði hvussu nógv er til av kolvetni, og hvørjar eginleikar tað hevur, sigur Niels Sørensen.

Hesin brunnurin, sum nú er boraður, er 3.901 metrar, og tað er rímiliga djúpt.

– Vit kundu hugsa okkum at bora nakað djúpri, men tað verður trupult at bora, tá vit tosa um slíka djúpd, sigur Niels Sørensen.

Faroe Petroleum hevur eisini eina boring á Langvulin økinum, men hon er komin so stutt áleiðis, at enn ber ikki til at siga tað stóra um ta boringina.

– Tann boringin er eystan fyri markið og liggur nær upp at Corona rygginum, og tað er í tí umráðnum, at nógv kolvetni verður funnið. Men tað er ov tíðliga at siga nakað, vit bora í basalt enn, sigur Niels Sørensen.

Men boringin á Anne Marie økinum hevur givið felagnum áræði at halda fram.

– Loyvið er stórt, og kjakast kann, um vit hava bora á rætta staðnum, men vit fara at gera allar tær kanningar, sum skulu til fyri at fáa staðfest, um vit framhaldandi skulu hava loyvið, ella vit skulu lata tað aftur, sigur Niels Sørensen.

### Ávirkar kursin

Hetta fundið hevur havt ávirkan á kursin á partabrøvunum hjá Faroe Petroleum.

– Ja, kursurin er lækkaður eini átta prosent á partabrævamarknaðinum í morgun, og kursurin lækkar gjarna, um fundið ikki er tað heilt stóra, sigur Niels Sørensen.

Men felagið hevur fleiri aðrar boringar, sum eisini geva góðar vónir.

– Jú, vit hava eina boring fyri framman, og tað, sum vit leggja okkum eftir, er at hava fýra til seks brunnar um árið, fyri at sleppa undan ov stórum fokus á ta einu boringina, sigur Niels Sørensen.

Faroe Petroleum hevur júst keypt seg inn í framleiðslu.

– Tað merkir, at vit framleiðis yvir 3.000 tunnur av olju um dagin, og tað hevur sera stóran týdning fyri felagið. Hartil hava vit fýra fund, sum í løtuni verða kannað, og vit vita longu, at okkurt av hesum fundunum er kommersielt. Tað verður tískil útbygt og fer í framleiðslu, sigur Niels Sørensen.

# Einki greitt fyrr enn í morgin

**Sløkkiliðsmenn eru í løtuni við at kanna øll rúmini umborð, men tað arbeiðið verður neyvan liðugt fyrr enn seint í kvøld ella helst í morgin, sigur Hans Andrias Joensen, reiðari á Athenu**




*Sløkkiliðsmenn kanna í løtuni, um allur eldurin er bastur umborð á Athenu*

Leo Poulsen

Tað er einki greitt enn, hvussu støðan er umborð á Athenu í løtuni. Fríggjadagin komu sløkkiliðsmenn umborð á skipið, men teir fíltust á, at hava fingið skeivar upplýsingar um eldin umborð.

– Tíverri er tað soleiðis, at tá tú hevur við eitt skip at gera, sum er skrásett aðrastaðni, eru upplýsingarnar í besta lagi ivasamar og ofta beinleiðis skeivar, sigur Ted Simpson, varaleiðari á Cornwall Fire and Rescue.

Sue Philbrow, talskvinna hjá Thor, vísir tó hesum aftur og sigur, at manningin bar seg rætt at í øllum viðurskiftum.

Í dag verða øll rúmini umborð á Athenu gjøgnumgingin, og ikki fyrr enn tað arbeiðið er liðugt ber til at siga við vissu, hvussu støðan umborð er.

Hans Andrias Joensen, reiðari, sigur, at tað verður helst ikki greitt fyrr enn í morgin, at fult tamarhald er á støðuni.

Hann dugir ikki í løtuni at siga, um tað enn brennur umborð á Athenu.

– Tað er hetta, ið sløkkiliðsmenninir í løtuni kanna, sigur Hans Andrias Joensen.